

www.oljan.fo

**Jan Müller** 02 - 09 - 2011

# Oljan bjargar Norra

Tað er oljuvinnan, sum nú ger munin í búskaparligu gongdini í Noregi í mun til onnur lond í Europa. Hetta visa nýggjastu tølini frá limafyritøkunum í NHO, sum er høvuðsfakfelagið hjá norskum vinnulívi. Søgan um norsku oljuna er at síggja í stóru norsku vinnulívsmiðlunum í morgun. Kanningin vísir, at tað er høga virksemi í oljuvinnuni við røkt, nýggjum íløgum og umfatandi leitivirksemi á norska landgrunninum, sum stendur fyri búskaparliga vøkstrinum í Noregi. Oljuøkið er tann vinnan, sum ger munin millum gongdina í Noregi og øðrum londum í Europa sigur leiðandi búskaparfrøðingurin Tor Teig sambært heimasíðuni hjá NHO. Talan er um tað sokallaða búskaparliga vísitalið, sum kemur fram eftir, at tær 2325 limafyritøkurnar í NHO hava sagt sína hugsan um, hvat tær halda um støðuna í dag og fyri 2012. Hetta er so sett upp ímóti lyklatølum í norska og altjóða búskapinum. Keldur - www.olf.no og www.nho.no